# Leika í fyri at fjala út yvir sína egnu ómegd

**– Tá ið tjóðveldisflokkurin nú leikar í um tann førda vinnupolitikkin, er tað fyri at fjala útyvir sína egnu ómegd, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum**

VINNUPOLITIKKUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, veit ikki um hann skal taka tjóðveldisflokkin fyri fult.

Á flokstingi í Sumba í farna vikuskiftið, kom tjóðveldisflokkurin til ta niðurstøðu, at vinnupolitikkurin seinastu seks árini hevur rætt og slætt verið ein skandala og at tað var eitt mistak at lata Fólkaflokkin umsita vinnumál.

Flokkurin sipaði til alivinnuna, sum hann sigur, var lorkað burtur av politiskum ósketni. Flokkurin heldur eisini, at onki sást til ein visjóneran vinnupolitikk hesi árini.

– Eg fái ikki gjørt annað at merkja mær sjónarmiðið hjá flokkinum, sigur Bjarni Djurholm.

Men hann er alt annað enn samdur.

– Hetta er onki annað enn ein roynd at venda eygunum frá síni egnu ómegd og innanfloks klandri.

– Hetta er eisini ein roynd at finna syndabukkar fyri tað, sum teir nú halda, átti at verðið gjørt.

### Nú ber nógv til

Bjarni Djurholm sigur, at hann kann eisini staðfesta, at nógv av tí, sum ætlanin var at fremja í undanfarnu samgongu, men sum ikki bar til við tjóðveldisflokkinum í samgongu, ber væl til, nú tjóðveldisflokkurin ikki er í samgongu longur.

Hann vísir á, at samgongan er rættiliga virkin á vinnuligа økinum og seinni í vár kemur eisini ein orðaður vinnupolitikkur.

– Eg kann ikki gera við, at tjóðveldisflokkurin bara vil sita í samgongu, tá ið alt í samfelagnum gongur sum eftir ánni.

– Men so skjótt, tað fór at reka ímóti, rýmdi hann undan ábyrgdini og setti seg í andstøðu at finnast at.

Bjarni Djurholm sigur, at nú er veruleikin ein heilt annar enn hann var, táið tjóðveldisflokkurin var við í samgonguni.

– Men bæði eg sjálvur og fólkaflokkurin sum heild, hava so gjørt av at standa við ta ábyrgd, vit hava átikið okkum og sostatt vilja vit eisini føra politikk, nú tíðirnar eru farnar at versna aftur.



*–Tjóðveldisflokkurin roynir nú at finna syndabukkar fyri tað, sum ikki varð gjørt, sigur BjarniDjurholm*

Hann sigur at hann kann onki gera við, at tjóðveldisflokkurin stakk í sekkin tá ið á stóð

– Tað er teirra egni trupulleiki og ikki mín.

### Eitt stórt tak

Landsstýrismaðurin í vinnumálum ásannar, at alivinnan er minkað burtur í onki.

– Tað er eitt samanfall av nógvum, ógvuliga óhepnum orsøkum og tað veit tjóðveldisflokkurin av.

– Sjálvandi var tað harmiligt, at tað gekk sum tað gekk. Øll kunnu gera sítt arbeiði betri, men tað er alt ov einfalt at geva politiska myndugleikanum alla skyldina fyri at tað gekk, sum tað gekk við alivinnuni.

Ein høvuðsorsøk til at alivinnan small, var sjúka, men nú kunnu við koppseta.

– Annars hevur alivinnan gingið við halli at kalla alla tíðina heilt síðani 2001, so trupulleikarnir eru ikki nýggir. Somuleiðis vísa kanningar, at skal alivinnan fáast á føtur aftur, má framleiðslukostnaðurin fyri hvørt kilo lækkast eisini 25% fyri at hon skal hava nakran møguleika at standa seg.

– Tað verður størsta takið í royndunum at byggja vinnuna uppaftur.

Bjarni Djurholm sigur, at tað fer at standa til vinnuna sjálva at laga seg til.

Annars vísur Bjarni Djurholm á, at hann hevur alla tíðina mett, at tað var ein fortreyt fyri alivinnuni, at útlendingar eisini sluppu at gera meiri íløgur í hana.

– Men tað hevur verið fullkomiliga bannlýst at nevnt tað við tjóðveldisflokkinum í samgongu. Og flokkurin setti so hart uppá hett,at hann enntá kravdi at fáa við í sjálvt samgonguskjalið, at luttøkan hjá útlendingum í føroysku alivinnuni, skuldi ikki økjast.

Men nú tjóðveldisflokkurin er farin í andstøðu, eru eisini tey viðurskiftini fingin í rættlag, soleiðis at nú sleppa útlendingar eisini at gera íløgur í føroysku alivinnuna



## Improvisera og improvisera enn einaferð

**Sjónleikaraskeið fyri royndar og óroyndar ungar sjónleikar verður í Klaksvík um vikuskiftið**

Við Eyð Matras sum undirvísara í "improvisatión" og Hjørdis Johansen sum undirvísara í "teatersport", verður lagt upp til spennandi og stuttligar avbjóðingar.

- Um tú ongar royndir hevur innan sjónleik, er hetta skeiðið fyri teg. Og hevur tú royndir innan sjónleik, so er tað upp á tíðina at tú meldar teg, sum tikið verður til í innbjóðingini.

Skeiðið byrjar í kvøld og endar sunnudagin.



*Tyrlan hevur alt at siga fyri fólkini á útoyggj. Nú verður arbeitt við at víðka túratalið til meginøkið*

## Fleiri tyrlutúrar til útoyggjarnar

**Stóra Dímun:** Gongst sum ætlað so er ikki óhugsandi, at fólkið í Stóru Dímun fer at kunna sleppa av oynni og heimaftur sama dag eina ferð um vikuna.

Tey í Útoyggjafelagnum kunnu nú frøast um, at tað eru batar at hóma innan tyrluflúgvingina til útoyggjarnar.

Sagt verður, at tað hava verið samráðingar millum Atlantsflog og Strandferðsluna um at endurnýggja sáttmálan um tyrluflúgvingina til útoyggjarnar. Meirkostnaðurin, sum stendur av hesum, er játtaður.

Tað sum nú verður arbeitt við, er at gera ábøtur á ferðaætlanina, soleiðis at Stóra Dímun, sum einans hevur tyrluna at dúva uppá, fær ein dupultan túr eina ferð um vikuna. Umframt hetta verður lagt upp til, at tað verður flogið mánadag til allar útoyggjarnar ein part av árinum.

Næmingar, sum búgva á útoyggj og ganga í skúla á Miðnámsskúlum á meginøkinum kunnu haraftrat fáa stuðul til gjald av ferðaseðlunum við tyrluni.

**sb.**

## Rúsdrekkalógin til viðgerð á landsstevnu

**Havn:** Um vikuskifti heldur Blái Krossur landsstevnu sína, har limirnir í felagsskapinum seta hvørjum øðrum stevnu í Meinigheitshúsinum í Havn.

Byrjað verður leygarmorgunin, tá ein fyrilestur verður um, hvussu ein kann møta rákinum í samfelagnum, og síðani verður hildið fram seinnapartin við aðalfundi.

Tá sjálvur aðalfundurin er liðugur verður pallborðsfundur um rúsdrekkalógina. Her fara Alfred Olsen, Bjarni Djurholm, Sólborg Dulavík og Ejvind Mouritsen at siga sína hugsa um hesa lógina, og um hon livir upp til sítt endamál.

Sunnudagin verður, umframt gudstænastu eisini hildið familjumøti í Vesturkirkjuni. Landsstevnan endar sunnukvøldið kl. 18, tá møtið verður í Meinigheitshúsinum har Reimund Langgaard talar.

Blái Krossur Føroyar hevur í løtuni átta limafeløg kring landið, og íalt eru 1.200 fólk knýtt at felagsskapinum.

**sb.**

## Morgunmatiné við messing

**Dómkirkjan:** Leygardagin kl. 11:30 verður enn eitt høvi at fara til matiné í Dómkirkjuni.

Hesaferð verða konsertir fyri trompet, trombone og eufonium á skránni, við luttøku av eini messing-kvintett og eini messing-oktett.

Tónleikarar til hetta tiltakið verða Bergitte Schnakenburg á klaver, umframt Tróndur Herason, Ken Jones, Dávur Juul Magnussen, Heini Andreasen, Sunniva Bæk, Rebekka Gaard, Glenn M. Samuelsen og Pauli Petersen.

**sb.**